


## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 23. apríl 2007 samtykti broyting í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at eitt økið uppá uml. 4.500 $m^2$ á Argjaboðagøtu verður broytt frá B3-vinnuøki til C3-øki til miðstaðarendamál.

Broytingin umfatar litra a og matr. nr. 34 a, Kirkjubø.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 21. mai til og við 11. juni 2007, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 21. august 2007.

**Tórshavnar kommuna**




## Búskaparfrøðingur

Tórshavnar kommuna søkir eftir búskaparfrøðingi til spennandi starv á roknskapardeildini.

**Uppgávur**
Sum búskaparfrøðingur ráðgevur tú stovns- og deildarleiðarum í búskapar- og fíggjarspurningum. Tú er við til uppseting av fíggjarætlanum, roknskapum og ávegis uppgerðum. Eisini er tú við til at loysa minni og størri projektuppgávur.

Harumframt ert tú við til at menna og røkja búskaparskipanina, sum byggir á Microsoft Dynamics (Navision).

Tórshavnar kommuna bjóðar tær eitt starv í einum spennandi og dynamiskum umhvørvi, við sjálvstøðugum uppgávum, ið geva tær góðar møguleikar fyri fakligari og persónligar menning.

**Setanin**
Vit rokna við at tú hevur viðkomandi búskaparliga útbúgving sum t.d. HA, HD ella Cand. Merc.

Starvið verður lønt eftir útbúgving og royndum sambært sáttmálanum við avvarðandi yrkisfelag.

**Upplýsingar um starvið**
Fleiri upplýsingar fært tú við at ringja til Hera Olsen, roknskaparleiðara ella Janus Isfeldt deildarleiðara á telefon 302010.

**Umsóknarfreist**
Umsókn við viðmælum og prógvum skal sendast til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 100 Tórshavn og vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. mai 2007.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

EL.FO
Góðk. EL-innleggjari Tlf. 21 08 72 - 21 50 02
EL.FO Sp/F · Viðargøta 62 · 160 Argir

## Elektrikkarar

Søkt verður eftur Elektrikkarum at byrja skjótast møguligt. Arbeitt verður við fjølbroyttum uppgávum.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði.
- Góðar arbeiðsumstøður.
- Eitt umhvørvi í broyting.

**Vit ynskja:**
- At tú hevur sveinabræv sum elektrikkari.
- At tú er fyrikomandi, ágrýtin.
- At tú hevur áhuga fyri fakinum.
- At tú kann arbeiða sjálvstøgut og hevur góð samstarvsevnir.

Størvini verða sett skjótast gjørligt.

Ógvuliga góð lønarviðurskifti.

Talan er um fast starv, fulla tíð.

**Set teg í samband við:**
EL.FO
Fartelefon 215002



## Deildarsjúkrarøktarfrøðingur

Á Ellis – og umlættingarheiminum er eitt starv sum deildarsjúkrarøktarfrøðingur á starvsbrøki 0,8., leyst at søkja. Starvið verður sett skjótast til ber.

Deildarsjúkrarøktarfrøðingurin hevur, við tilvísing til leiðaran, ábyrgdina av dagliga virkseminum á Umlættingarheiminum, starvsfólkaleiðsluni, vegleiðing av starvsfólki og praktikkvegleiðing til lesandi og næmingar og upptøku av fólki til umlætting.

**Vit bjóða**
eitt avbjóðandi og sjálvstøðugt starv, innan geriatriska økið. Eitt starv har umlættingarheimið er arbeiðsstaður. Tó so, at nakrar sjúkrarøktaruppgávur eisini eru á Ellisheiminum. Arbeiðstíðin er mest í dagvaktum.

**Førleikakrøv**
Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
Hevur starvsroyndir innan geriatriska økið
Leiðsluroyndir og/ ella er sinnað/ur at fara undir leiðsluútbúgving.

**Vit ynskja ein deildarleiðara sum hevur**
- hug og hegni at leiða
- góð samskiftis og samstarvsevni
- hug og hegni at arbeiða innan eldrarøkt á einum stovni við fjølltáttaðum uppgávum.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar.

**Nærri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Idu Sørensen, leiðara á tlf. 317339 / 311839.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn verður at senda til Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í seinasta lagi fríggjadagin 1. juni 2007 kl. 12.00. Brævbjálvin skal merkjast: „Deildarsjúkrarøktarfrøðingur".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**